SEV

NETROKNSKAPUR 2020



# Fimm grønar orkukeldur í elskipanini í 2020

www.sev.fo

# Elfelagið SEV
# Netroknskapur
# 2020







# Leiðsluátekning

Nevndin og stjórnin hava í dag lagt fram netroknskapin fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020 hjá Elfelagnum SEV. Netroknskapurin er eisini ein partur av ársfrásøgnini hjá Elfelagnum SEV.

Netroknskapurin er gjørdur í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at netroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2020 og av úrslitinum av netvirkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2020.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, hin 19. mars 2021

## Stjórn

*Hákun Djurhuus*
*Stjóri*

## Fíggjarleiðsla

*Bogi Bendtsen*
*Deildarstjóri fyri fyrisiting*

## Nevnd

| | |
|---|---|
| *Kári Johansen*<br>*Formaður* | *Haraldur S. Hammer*<br>*Næstformaður* |
| *Niclas Hentze* | *Oddmar á Lakjuni* |
| *Poul Klementsen* | *Sonni L. Petersen* |
| *Sune Jacobsen* | |

# Átekning frá óheftum grannskoðara

**TIL LEIÐSLUNA Í ELFELAGNUM SEV**

Vit hava grannskoðað netroknskapin, sum inniheldur upphæddir fyri rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, peningastreym og notur fyri Elfelagið SEV fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2020. Upphæddirnar í netroknskapinum eru partur av ársfrásøgnini fyri Elfelagið SEV fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2020, sum vit hava grannskoðað.

Tað er okkara fatan, at netroknskapurin fyri Elfelagið SEV fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2020 á øllum týðandi økjum er gjørdur í samsvar við tær roknskaparreglur, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

**GRUNDARLAG FYRI NIÐURSTØÐUNI**
Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða netroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, eisini hava vit hildið hinar etisku skyldurnar hjá okkum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**ÁHERÐSLA Á VIÐURSKIFTI Í NETROKNSKAPINUM – NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR**
Vit skulu gera vart við upplýsingarnar í innganginum av hesari váttan, harav tað framgongur, at netroknskapurin er gjørdur eftir teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti.

Hesi viðurskifti hava ikki ávirkan á okkara niðurstøðu.

**ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV NETROKNSKAPINUM**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera netroknskapin samsvarandi teimum roknskaparreglum, sum verða lýstar í nýttum roknskaparhátti. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at netroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

**ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS AV AT GRANNSKOÐA NETROKNSKAPIN**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at netroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa við høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í netroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðar fyri týðandi skeivleikum í netroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

Tórshavn, hin 19. mars 2021

P/F JANUAR

løggilt grannskoðanarvirki

| | |
|---|---|
| Hans Laksá | Jógvan Amonsson |
| Statsaut. revisor | Statsaut. revisor |

# Høvuðs- og lyklatøl

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | |
| Nettosøla | 553.407 | 511.096 | 429.648 | 434.900 | 421.436 |
| Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar | 114.484 | 107.697 | 102.611 | 90.602 | 90.739 |
| Rakstrarúrslit | 65.351 | 43.291 | 61.696 | 55.684 | 56.661 |
| Fíggjarligir postar, netto | -23.290 | -19.977 | -24.102 | -21.348 | -35.106 |
| **Ársúrslit** | **30.283** | **30.247** | **28.625** | **33.302** | **12.351** |
| | | | | | |
| Fíggjarstøða | | | | | |
| Fíggjarstøðujavni | 1.722.098 | 1.458.891 | 1.601.382 | 1.337.184 | 1.295.072 |
| **Eginogn** | **563.496** | **556.291** | **451.323** | **449.456** | **449.734** |



# Leiðslufrágreiðing

## HØVUÐSVIRKSEMIÐ

Elfelagið SEV er eitt interkommunalt lutafelag, ið hevur til endamáls at fáa til vega elmegi og býta hana millum íbúgvarnar í limakommununum. Eftir viðtøkum elfelagsins skal endamálið fremjast sambært vinnuligum meginreglum á búskaparliga tryggum støði og við fyriliti at náttúru og umhvørvi.

Hesin roknskapur fyri netvirksemið hjá SEV er ein partur av samlaða roknskapinum hjá SEV. Frágreiðingin fevnir um netvirksemið, íroknað fyrisiting hjá felagnum í tíðarskeiðinum 1. januar 2020 til 31. desember 2020.

## BÝTI AV AVLOP Í RAKSTRI

Framleiðsluparturin skal hava allan sín rakstrarkostnað rindaðan, íroknað kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur. Harumframt miðar framleiðsluparturin eftir at hava eitt yvirskot svarandi til 5% av primoeginpeninginum.

Orsøkin til, at úrslitið fyri framleiðslupartin gjørdist lægri enn roknaða kravið er, at ársúrslitið fyri netpartin verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur umframt eina eginfígging upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Fyri útgreining av framferðarhátti og útrokning av býti millum framleiðslu- og netpartin, verður víst til notu 1.

## GONGDIN Í VIRKSEMINUM

## ENDURNÝGGING

Arbeiðið at endurnýggja og víðka 10, 20 og 60 kV netið heldur fram. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við myndugleikar, kommunur, Landsverk og Føroya Tele.

Felagið hevur í ár bygt fleiri nýggjar 10 og 20 kV trafostøðir kring landið. Eisini verður 60 kV-støðin í Vestmanna endurnýggjað, og verður væntandi liðugt fyrsta ársfjórðing 2021. Nýggj 20 kV-støð verður bygdur afturat gomlu koplingarstøðini á Sundi, samstundis sum nýggja 60 kV-støðin á Sundi í sambandi við støð 3 er liðug og tikin í nýtslu. Í sambandi við vindmyllulundina í Suðuroy verður ein nýggj koplingarstøð bygd í Hovi. Henda støðin skal eisini rúma battarístøð og synkronkompensatori, sum skal setast upp í sambandi við nýggju vindmyllulundina í Porkerishaganum. Støðin væntast at verða liðug við endan av 2021.

## VIÐLÍKAHALD

Aftur í ár er nógv viðlíkahaldsarbeiði farið fram á netinum, alt fyri at tryggja eina støðuga streymveiting til kundan.

Mynd 1 vísir eitt yvirlit yvir feilir seinastu mongu árini. Myndin vísir, hvussu talið á feilum er fækkað frá 1989 til 2020. Miðvísa viðlíkahaldsarbeiðið saman við endurnýggingini av elnetinum, er orsøkin

*Mynd 1: Feilir pr. ár 1989 - 2020*



*Mynd 2: Útgreining av feilum 2020*




til, at SEV í dag hevur munandi færri feilir á háspenningsnetinum.

16 av teimum 20 feilunum, ið vóru skrásettir í 2020, eru ikki feilir, sum merkjast hjá øllum kundunum samstundis, men merkjast í avmarkaðum økjum av landinum — hetta kann vera ein kaðalfeilur í einum ávísum býlingi, ella ein háspenningssikring, ið er farin í eini transformarastøð. 4 feilir vóru blackout, har allir kundarnir í økinum mistu veitingina samstundis.

**FEILIR Á HÁSPENNINGSKERVINUM Í 2020**
Í 2020 vóru 20 feilir á háspenningskervinum. Mynd 2 vísir, hvørjir feilir hava verið, og hvar í skipanini teir vóru.

**GONGDIN Í FÍGGJARLIGU VIÐURSKIFTINUM**

**ÚRSLITIÐ**
Samlaða úrslitið fyri netpartin gjørdist 30,3 mió. kr. í 2020, og 30,2 mió. kr. í 2019.

**INNTØKUR**
Tað eru tríggir tættir, ið ávirka høvuðsinntøkuna hjá SEV. Hesir tríggir tættir eru elprísbroyting, broyting í elnýtsluni, og forskjóting ímillum ymiskar kundaprísbólkar.

Inntøkurnar hjá netpartinum stava frá sølu av elmegi til vinnuligar, privatar og almennar kundar, herundir kommunur. Harumframt stava inntøkurnar frá føstum gjøldum, íbindingargjøldum og øðrum ómaksgjøldum frá somu kundum og annað.

Felagið hækkaði 1. januar 2020 elprísin við 0,05 kr. pr. kWt fyri allar kundar felagsins uttan "ídnaðarkundarnar", har prísurin hækkaði 0,10 kr. kWt fyri at styrkja búskap felagsins.

**NETTOSØLAN**
Nettosølan er nú farin upp um eina hálva mia. kr. og sølan hevur sett met við 370,4 GWt, svarandi til eina framgongd í søluni uppá 5,7% í mun til 9,3% undanfarna ár. Talan er soleiðis um ein stóran vøkstur bæði árini.

Inntøkan frá kWt søluni og føstu gjøldunum er 540,9 mió. kr. móti 487,4 mió. kr., og henda stavar serstakliga frá eini øking í søluni til fiskivinnu og aling og framleiðslu- og byggivirksemi. Eisini sølan til privatkundarnar eru økt. Inntøkurnar frá íbindingargjøldunum eru 11,2 mió. kr., sum er 12,8 mió. kr. lægri enn undanfarna ár. Inntøkan frá føstu gjøldunum er hækkað eitt vet í mun til undanfarna ár.



**ÓSEMJA UM AVROKNING AV ELFRAMLEIÐSLU TIL P/F VINDFELAGIÐ Í HÚSAHAGA**
Ósemja hevur tikið seg upp millum Elveitingareftirlitið á einari síðu, og P/F Vindfelagið í Húsahaga og SEV (net) á hinari síðuni um, hvussu avrokningin av elframleiðsluni skal uppgerast.

P/F Vindfelagið í Húsahaga og SEV (net) eru á einum máli um, at sambært útboðstreytunum hjá myndugleikanum og innlatnum tilboði í 2012 til myndugleikan er talan um, at SEV (net) skal veita P/F Vindfelagnum í Húsahaga eina inntøkutrygd upp á í minsta lagi 41,4 GWt. Hetta er, um myllurnar hjá vindfelagnum eru í tekniskum rakstrarførum standi.

Hesum er Elveitingareftirlitið ikki samt við vindfelagið og SEV (net) um. Talan er um ósemju komin í ljósmála í november/desember 2018, men sum hevur týdning fyri inntøkuviðurskiftini hjá felagnum. Niðanfyri standandi talva vísir upphæddirnar einstøku árini, sum ósemjan kann hava við sær fyri roknskapin hjá vindfelagnum, um sjónarmiðini hjá Elveitingareftirlitinum verða løgd til grund.

Av niðanfyri standandi talvu 1 framgongur, at sambært Elveitingareftirlitinum, tá 2020 eisini er innroknað, hevur SEV (net) avroknað 6,2 mió. kr. ov nógv fyri seinastu fimm árini til P/F Vindfelagið í Húsahaga. Hetta er peningur, sum vindfelagið sambært Elveitingareftirlitinum skal afturrinda móðurfelagnum SEV (net).

Upprunaliga prísavtalan millum partarnar inniheldur ikki eina rætta endurgeving av inntøkutrygdini, sum hon var lýst í útboðnum hjá myndugleikanum og tilboðnum hjá vindfelagnum. Vindfelagið og SEV (net) eru komin ásamt um at rætta upprunaligu prísavtaluna, og senda hana til Elveitingareftirlitið við umbøn um at góðkenna nýggju rættaðu avtaluna soleiðis, at hon endurgevur upprunaligu treytirnar um inntøkutrygd í útboðnum og tilboðnum. Grundað á hetta eru tølini ikki bókaði í roknskapinum. Nýggja rættaða prísavtalan er send Elveitingareftirlitinum tann 16. februar 2021, við áheitan um, at Elveitingareftirlitið góðkennir hesa. Elveitingareftirlitið viðger í løtuni málið.

Fyri at geva lesaranum eina fatan av ávirkanina av ósamsvarinum í talvu 1, verður í talvu 2 víst, hvussu sølan, ársúrslitið, millumrokningin við móðurfelagið og eginpeningurin hjá felagnum høvdu sæð út, um tølini vóru bókaði í roknskapinum.

Fyri nærri nágreining av tølunum hjá Vindfelagnum í Húsahaga verður víst til roknskapin fyri 2020 hjá felagnum, sum er at finna á www.sev.fo.

**Talva 1**
**ÓSAMSVAR MILLUM AVROKNAÐ AV FELAGNUM OG ÁSKOÐAN HJÁ ELVEITINGAREFTIRLITINUM, Í MIÓ. KR.**

| | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Tilsaman |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Elveitingareftirlitið metir P/F Vindfelagið í Húsahaga skal avroknast, GWt | 34,6 | 38,1 | 40,7 | 34,1 | 31,5 | 179,0 |
| P/F Vindfelagið í Húsahaga avroknað mótvegis SEV net, GWt | 41,4 | 41,4 | 40,3 | 40,5 | 35,4 | 199,0 |
| **Ósamsvar millum avroknað av felagnum og Elveitingareftirlitinum, GWt** | **-6,8** | **-3,3** | **0,4** | **-6,4** | **-3,9** | **-20,1** |
| **Ósamsvar millum avroknað av felagnum og Elveitingareftirlitinum, mió. kr.** | **-2,2** | **-1,1** | **0,1** | **-2,2** | **-1,3** | **-6,7** |
| Nettap sambært AIM ikki trekt frá áður fyri 2016-2019, mió. kr. | 0,1 | 0,1 | 0,2 | 0,1 | 0,0 | 0,5 |
| **Ósamsvar millum Elveitingareftirlitið og P/F Vindfelagið í Húshaga í mió. kr.** | **-2,1** | **-1,0** | **0,3** | **-2,0** | **-1,3** | **-6,2** |

**Talva 2**

**ÁVIRKAN, UM TØLINI VÓRU BÓKAÐI Í ROKNSKAPINUM SAMSVARANDI ÁSKOÐANINI HJÁ ELVEITINGAREFTIRLITINUM, Í MIÓ. KR.**

| Ávirkan av ósemju á søluna | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Tilsaman |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Søla sambært roknskapin | 14,2 | 13,7 | 12,7 | 13,7 | 12,4 | 66,6 |
| Søla eftir áskoðan hjá Elveitingareftirlitinum | 12,1 | 12,7 | 13,0 | 11,6 | 11,1 | 60,5 |
| **Ávirkan** | **2,1** | **1,0** | **-0,3** | **2,0** | **1,3** | **6,2** |

| Ávirkan av ósemju á ársúrslitið | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Tilsaman |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ársúrslit sambært roknskapin | -0,5 | 0,4 | -0,6 | -0,1 | -0,4 | -1,1 |
| Ársúrslit eftir áskoðan hjá Elveitingareftirlitinum | -2,2 | -0,3 | -0,4 | -1,7 | -1,5 | -6,2 |
| **Ávirkan** | **-1,7** | **-0,8** | **0,2** | **-1,7** | **-1,1** | **-5,1** |

| Ávirkan av ósemju á millumrokning við móðurfelag | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Millumrokning sambært roknskapin | 1,0 | 3,2 | 3,2 | 5,6 | 5,1 |
| Millumrokning eftir áskoðan hjá Elveitingareftirlitinum | -1,1 | 0,2 | 0,4 | 0,7 | -1,0 |
| **Ávirkan** | **-2,1** | **-3,1** | **-2,8** | **-4,8** | **-6,2** |

| Ávirkan av ósemju á eginpeningin | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginpeningur sambært roknskapin | 21,5 | 22,0 | 21,3 | 21,3 | 20,9 |
| Eginpeningur eftir áskoðan hjá Elveitingareftirlitinum | 19,8 | 19,4 | 19,1 | 17,3 | 15,8 |
| **Ávirkan** | **-1,7** | **-2,5** | **-2,3** | **-3,9** | **-5,1** |

## SUNDURGREINING AV SØLUNI Í KUNDABÓLKAR

Talva 3 vísir avroknaðu elsøluna í GWt til kundar felagsins. Víst verður annars til fleiri sundurgreiningar í tølunum innan søluna í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

## VAKSANDI ELSØLA

Í fleiri ár á rað er inntøkan vaksin næstan uttan undantak orsakað vaksandi elnýtslu. Árliga broytingin í elnýtsluni sæst í talvu 3.

Sum talvan fyri avroknaðu elsøluna vísir, so er stór framgongd í elsøluni til "Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna". Framgongdin í hesum bólkinum hongur saman við góðu gongdini hjá alivinnuni og pelagisku vinnuni seinastu árini, og stórar útbyggingar hjá hesum kundum viðførir ein øktan tørv eftir elmegi. Somuleiðis er stór framgongd í elsøluni til "Gerð, framleiðsla og byggivirksemi", og skyldast hetta, at virkaðar eru størri nøgdir av fiski, serliga innan pelagisku vinnuna.

Samlað er sølan økt við 5,7% í 2020 mótvegis eini øking í søluni í 2019 upp á 9,3%. Í miðal seinastu fimm árini hevur árligi vøksturin verið 5,2% móti einum árligum miðal vøkstri uppá 2,5% undanfarnu fimm árini. Í miðal seinastu 10 árini er avroknað 300 GWt til kundar felagsins. Frá 2016 til 2020 er vøksturin 79 GWt, svarandi til 21% av samlaði søluni í 2020. So talan er um sera stóran vøkstur í søluni seinastu árini til kundar felagsins.

Framgongdin í GWt-søluni sæst eisini aftur í inntøkunum frá streymsølu og føstum gjaldi, sum í 2020 eru øktar við 53,5 mió. kr. ella 11%. Inntøkuvøksturin er mest eyðsýndur í bólkunum "Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna" saman við "Gerð, framleiðsla og byggivirksemi" og "Sethús, íbúðir v.m.", sí talvu 4 herundir. Inntøkan frá íbindingargjøldunum fyri 2020 er lægri enn undanfarna ár. Samanlagt eru nettoinntøkurnar øktar við 42,3 mió. kr. í inniverandi ári sum stava frá meiri sølu og hækkandi prísum fyri hvønn seldan kWt.

**Talva 3**

**KUNDABÓLKAR Í GWT**

| | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | Broyting 19-20 GWt | Broyting 19-20 % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna | 25,9 | 26,4 | 29,4 | 29,2 | 31,1 | 36,6 | 37,9 | 42,1 | 56,8 | 70,6 | 83,9 | 13,4 | 18,9 |
| Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | 48,9 | 44,5 | 52,5 | 69,3 | 76,1 | 76,5 | 73,9 | 85,5 | 82,2 | 95,1 | 96,5 | 1,4 | 1,5 |
| Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi | 22,5 | 22,4 | 21,6 | 22,7 | 24,7 | 23,1 | 24,4 | 24,4 | 24,9 | 25,1 | 25,0 | -0,1 | -0,5 |
| Flutningur, postur og fjarskifti | 28,7 | 31,8 | 34,7 | 25,1 | 25,7 | 24,9 | 25,6 | 24,3 | 24,3 | 24,3 | 23,6 | -0,7 | -2,9 |
| Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur | 4,2 | 4,2 | 3,9 | 4,0 | 4,0 | 3,9 | 3,9 | 3,6 | 3,7 | 3,7 | 3,5 | -0,2 | -5,3 |
| Almennar og privatar tænastur, kirkjur, samkomur | 36,5 | 36,8 | 36,6 | 37,7 | 37,3 | 37,9 | 40,5 | 41,5 | 42,1 | 44,1 | 45,5 | 1,5 | 3,4 |
| Gøtuljós | 6,8 | 7,3 | 6,9 | 7,4 | 7,0 | 7,1 | 7,0 | 6,7 | 6,6 | 6,4 | 6,2 | -0,2 | -3,3 |
| Sethús, íbúðir, summarhús og neyst | 81,3 | 81,4 | 75,7 | 78,9 | 78,0 | 78,0 | 78,1 | 78,2 | 79,9 | 81,2 | 86,2 | 5,1 | 6,2 |
| **Tilsamans avroknað** | **254,8** | **254,8** | **261,3** | **274,3** | **283,9** | **288,0** | **291,4** | **306,3** | **320,5** | **350,4** | **370,4** | **20,0** | **5,7** |
| Árlig broyting í % | 1,1 | 0,0 | 2,6 | 5,0 | 3,5 | 1,4 | 1,2 | 5,2 | 4,6 | 9,3 | 5,7 | | |

**Talva 4**

**INNTØKUR STREYMSØLA OG FAST GJALD FRÁ KUNDABÓLKUM Í MIÓ. KR.**

| | 2020 | 2019 | Broyting 20-19 | Broyting 20-19 % |
|---|---|---|---|---|
| Landbúnaður, aling, fiskivinna og ráevnisvinna | 110,7 | 85,9 | 24,8 | 28,8 |
| Gerð, framleiðsla og byggivirksemi | 132,2 | 120,3 | 11,8 | 9,8 |
| Handils-, matstovu- og gistihúsvirksemi | 37,3 | 36,2 | 1,1 | 3,1 |
| Flutningur, postur og fjarskifti | 34,1 | 33,6 | 0,6 | 1,7 |
| Fígging, trygging og aðrar vinnutænastur | 5,1 | 5,2 | 0,0 | -0,9 |
| Almennar og privatar tænastur, kirkjur, samkomur | 68,7 | 64,1 | 4,6 | 7,1 |
| Gøtuljós | 9,6 | 9,6 | 0,0 | 0,0 |
| Sethús, íbúðir, summarhús og neyst | 143,1 | 132,5 | 10,7 | 8,0 |
| **Tilsamans avroknað** | **540,9** | **487,4** | **53,5** | **11,0** |

## SØLAN SUNDURGREINAÐ Á PRIVATAR KUNDAR Á OYGGJAR

Talva 5 vísir nýtsluna fyri privatar kundar býtt sundur á oyggjar.

Sambært talvu 5 hava kundar í Viðoy hægstu miðalnýtsluna, meðan kundar í Streymoy hava eina miðalnýtslu upp á 3.713 kWt. Miðalnýtslan fyri allar oyggjar er 3.745 kWt. Smærri pláss sum Fugloy, Hestur, Skúvoy og Mykines hava helst fleiri kundar, tí hús standa tóm partar av árinum. Hetta ávirkar miðalnýtsluna fyri hvønn kunda á hesum plássum.

Víst verður annars til fleiri sundurgreiningar í tølunum innan søluna í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

## ÚTREIÐSLUR

## ÚTREIÐSLUR TIL KEYP AV ELFRAMLEIÐSLU, SKIPANARBERANDI TÆNASTUM

Útreiðslurnar í 2020 vóru 523,1 mió. kr., harav 361,6 mió. kr. vóru fyri keyp av elframleiðslu og skipanarberandi tænastum.

Talva 5

### NÝTSLA FYRI PRIVATKUNDAR EFTIR OYGGJUM

| | kWt pr. oyggj 2020 | kWt pr. oyggj 2019 | kWt pr. oyggj 2018 | Kundar 2020 | Kundar 2019 | Kundar 2018 | Miðalnýtsla hvør kundi 2020 | Miðalnýtsla hvør kundi 2019 | Miðalnýtsla hvør kundi 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Borðoy | 8.344.222 | 8.058.751 | 7.996.263 | 2.161 | 2.145 | 2.136 | 3.861 | 3.757 | 3.744 |
| Eysturoy | 18.672.895 | 18.101.953 | 17.696.238 | 4.511 | 4.472 | 4.507 | 4.139 | 4.048 | 3.926 |
| Fugloy | 38.624 | 35.103 | 36.898 | 13 | 13 | 13 | 2.971 | 2.700 | 2.838 |
| Hestur | 49.989 | 51.811 | 50.459 | 27 | 29 | 27 | 1.851 | 1.787 | 1.869 |
| Kalsoy | 163.322 | 160.243 | 161.664 | 82 | 85 | 81 | 1.992 | 1.885 | 1.996 |
| Koltur | 7.942 | 8.137 | 9.004 | 2 | 2 | 2 | 3.971 | 4.069 | 4.502 |
| Kunoy | 275.981 | 279.096 | 272.700 | 71 | 68 | 69 | 3.887 | 4.104 | 3.952 |
| Mykines | 70.114 | 71.992 | 72.148 | 41 | 42 | 41 | 1.710 | 1.714 | 1.760 |
| Nólsoy | 415.988 | 392.259 | 405.441 | 142 | 137 | 138 | 2.929 | 2.863 | 2.938 |
| Sandoy | 2.241.602 | 2.122.007 | 2.115.370 | 712 | 687 | 697 | 3.148 | 3.089 | 3.035 |
| Skúvoy | 81.182 | 78.916 | 81.220 | 41 | 43 | 40 | 1.980 | 1.835 | 2.031 |
| Streymoy | 37.752.402 | 37.243.087 | 36.645.044 | 10.168 | 10.113 | 9.987 | 3.713 | 3.683 | 3.669 |
| Suðuroy | 7.339.604 | 7.052.086 | 7.039.166 | 2.287 | 2.314 | 2.300 | 3.209 | 3.048 | 3.061 |
| Svínoy | 47.742 | 43.041 | 41.156 | 22 | 22 | 24 | 2.170 | 1.956 | 1.715 |
| Vágoy | 5.673.040 | 5.622.102 | 5.578.304 | 1.423 | 1.395 | 1.404 | 3.987 | 4.030 | 3.973 |
| Viðoy | 960.164 | 934.190 | 902.287 | 230 | 230 | 224 | 4.175 | 4.062 | 4.028 |
| **Tilsamans** | **82.134.813** | **80.254.774** | **79.103.362** | **21.933** | **21.797** | **21.690** | **3.745** | **3.682** | **3.647** |

## STÝRING AV ELSKIPANINI OG SKIPANARBERANDI TÆNASTUR

Í samlaðu útreiðslunum hjá verkunum er íroknað kostnaðurin av at framleiða elmegi, kostnaðurin fyri stýring av elskipanini og kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur.

Kostnaðurin tilsamans kann sundurgreinast í kostnaðin fyri tilrættislegging og stýring av tøka máttinum, rullandi máttinum, reaktiva máttinum, spenningsregulering og frekvensregulering. Framleiðsluverkini selja sína framleiðslu av elmegi til netvirksemið, sum rindar fyri keypið umframt kostnaðinum fyri tí partinum av skipanarberandi tænastum, sum verkini standa fyri.

## KOSTNAÐUR FYRI STÝRING AV ELSKIPANINI

Stýringin av elnetinum í Suðuroy fer fram á framleiðsluverkinum í Vági, meðan stýringin av elnetinum í meginøkinum fer fram á Fossáverkinum í Vestmanna.

Kostnaðurin fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum upp á 2,3 mió. kr., er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum eitt vanligt rakstrarár upp á 3,0 mió. kr., frádrigið kostnaðinum fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum upp á 0,7 mió. kr. Kostnaðurin fyri vanligan rakstur á verkinum er settur til at verða tann sami, sum tað kostar at reka Mýru- og Heygaverkið tilsamans, svarandi til 0,7 mió. kr. eitt vanligt rakstrarár. Sami kostnaður fyri stýringina av elnetinum á Fossáverkinum er brúktur til kostnaðin fyri stýringina av elnetinum í Suðuroy svarandi til 2,3 mió. kr.

## KOSTNAÐUR FYRI SKIPANARBERANDI TÆNASTUR

Kostnaðurin fyri skipanarberandi tænasturnar er mettur til at verða 5% av samlaða rakstrarkostnaðinum, íroknað partar av avskrivingum av Sunds- og Vágsverkinum, svarandi til ávíkavist 11,3 og 2,0 mió. kr. Talan er um eina ásetta meting av kostnaðinum.

Kostnaðurin fyri skipanarberandi tænasturnar kring landið annars, er grundaður á kostnaðin hjá felagnum av smáverkum kring landið, sum verða mett sum eyka verk ella tøkur máttur. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar endurgoldnan fyri veitingartrygd, restin av kostnaðinum verður endurgoldin sum keyp av framleiðslu til víðarisølu. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri løn og tilfar fyri termiska framleiðslu av elmegi umfataða sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum verður endurgoldin sum keyp av framleiðslu til víðarisølu.

## SAMLAÐUR KOSTNAÐUR FYRI STÝRING AV ELSKIPANINI OG SKIPANARBERANDI TÆNASTUR

Samlaður kostnaður fyri stýring av elnetinum í Føroyum er 4,6 mió. kr., meðan kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur á Sundsverkinum og Vágsverkinum er settur til 13,3 mió. kr. Kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur frá øðrum verkum er 5,2 mió. kr. Samlaði kostnaðurin fyri stýring av elnetinum og skipanarberandi tæastur er mettur til 23,1 mió. kr.

Felagið arbeiðir í løtuni við at endurskoða kostnaðirnar fyri stýring av elskipanini og skipanarberandi tænastur. Ávegis úrslit benda á, at hesir kostnaðir eru hægri enn kostnaðirnir, sum eru innroknaðir í roknskapinum.

## LØNARÚTREIÐSLUR 0,5 MIÓ. KR. HÆGRI

Nógv virkisøkir eru í felagnum, og SEV fylgir teimum almennu sáttmálunum, sum eru galdandi á teimum ymisku økjunum. Samlaðu lønarútreiðslurnar í 2020 vóru 43,3 mió. kr. móti 42,8 mió. kr. í 2019 íroknað fyrisiting, svarandi til eina størri nýtslu upp á 0,5 mió. kr.

Lønarútreiðslurnar fyri netvirksemið vóru 26,1 mió. kr. í 2020 móti 24,0 mió. kr. í 2019, ella ein meirnýtsla upp á 2,1 mió. kr., meðan lønarútreiðslurnar til fyrisitingina vóru 17,2 mió. kr. í 2020 móti 18,8 mió. kr. í 2019, svarandi til eina minni nýtslu upp á 1,6 mió. kr. Tá er javningin fyri eftirlønarskylduna innroknað við 0,7 mió. kr.

Verður sæð burtur frá javnan av eftirlønarskylduni, eru lønarútreiðslurnar til fyrisitingina í 2020 16,5 mió. kr. móti 16,0 mió. kr. í 2019, sum eru 0,5 mió. kr. hægri enn undanfarna ár.

## TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR 3,9 MIÓ. KR. HÆGRI

Útreiðslurnar til tilfar og tænastuveitingar í 2020 vóru 33,8 mió. kr. móti 29,9 mió. kr. í 2019, og eru 3,9 mió. hægri í 2020 enn 2019. Kostnaðurin kann sundurgreinast í netvirksemi og fyrisiting.

## NETVIRKSEMIÐ

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til netvirksemið í 2020 vóru 12,3 mió. kr. móti 10,0 mió. kr. í 2019, svarandi til eina størri nýtslu upp á 2,3 mió. kr. grundað á nýtslu hjá rakstrardeildum felagsins.

## FYRISITING

Útreiðslur til tilfar og tænastuveitingar til fyrisiting í 2020 vóru 21,5 mió. kr. móti 19,9 mió. kr. í 2019, og eru hesar sostatt 1,6 mió. kr. hægri.

Víst verður annars til fleiri sundurgreiningar í tølunum innan kostnaðin fyri tilfar og tænastuveitingar í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

## FÍGGJARKOSTNAÐUR

Rentuútreiðslurnar vóru 23,3 mió. kr. í 2020 móti 20,0 mió. kr. í 2019 svarandi til ein hægri fíggjarkostnað upp á 3,3 mió. kr. Í samlaða talinum eru íroknaðar kapitalútreiðslur upp á 1,6 mió. kr. frá dótturfeløgum.

Í løtuni hevur felagið eina samlaða langfreistaða bruttoskuld upp á 1.638 mió. kr. við fastari rentu stavandi frá lánsbrøvum við fastari rentu og eini rentuumbýtingaravtalu. Nærri lýsing av fíggjarkostnaðinum er at finna í samtaksroknskapinum hjá felagnum, sum sæst á www.sev.fo.

## AVSKRIVINGAR

Avskrivingarnar fyri 2020 vóru 49,1 mió. kr. móti 44,4 mió. kr. í 2019, harav 41,6 mió. kr. stava frá netvirkseminum og 7,5 mió. kr. frá fyrisitingini.

## ÍLØGUR

Íløgur í koplingarstøðir og net eru fyri tilsamans 178,2 mió. kr. í 2020 í mun til 134,4 mió. kr. í 2019, sum talva 6 vísir.

Tilgongd frá arbeiði í gerð og beinleiðis bókað til støðisogn (avskrivingargrundarlagið), eru víst í talvu 7. Víst verður til arbeiði í gerð og til notu 7 í roknskapinum.

Stórar íløgur innan net, koplingarstøðir, bygningar og annað innan netið eru gjørdar seinastu árini og í 2020, eins og stórar íløgur standa fyri framman. Serliga er talan um, at netið er styrkt og skal framhaldandi styrkjast fyri at gera SEV ført fyri at taka ímóti meiri vindorku og veita tann streym, sum kundar felagsins hava tørv á.

Nógvar íløgur eru gjørdar seinastu árini í nýggjar koplingarstøðir, og 2020 er einki undantak. Talan er um støðir, sum eru týdningarmiklar fyri at kunna føra elorku fram til einstøku økini kring landið. Samanlagt eru íløgur í koplingarstøðir gjørdar fyri 51,5 mió. kr., meðan íløgur í net v.m. eru 101,0 mió. kr.

SEV er eisini farið undir at byggja nýggja koplingarstøð í Vestmanna. Henda koplingarstøðin kemur í staðin fyri gomlu støðina, sum nú hevur tænt fyri seg. Arbeiðið byrjaði við endan av 2018, og støðin væntast at verða liðug fyrsta ársfjórðing 2021.

Umframt íløgurnar í koplingarstøðirnar eru stórar íløgur gjørdar í kaðalleggingum, serliga í sambandi við dagføring av tunnilum.

Víst verður annars til nærri umrøðu um íløgurnar í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

## GJALDFØRIÐ

Gjaldførið er ikki skilt sundur millum framleiðslu og net, og hava millumrokningar millum partarnar verið nýttar. Í roknskapinum hjá framleiðsluverkunum er gjaldførið ásett til 0 mió. kr., men alt virksemið hjá verkunum verður fíggjað av netpartinum, sum tryggjar verkunum neyðugt gjaldføri. Sama er galdandi fyri vindfeløgini, sum eisini verður fíggjað av netpartinum.

Tøkur peningur felagsins við ársenda er 223,9 mió. kr. móti 125,1 mió. kr. í 2019. Harumframt koma óbrúktir trekningsrættir og kassakredittir í peningastovnum upp á tilsamans 302,8 mió. kr.

Sostatt er tøki peningurin, kredittir og óbrúktir trekningsrættir 526,6 mió. kr. móti 690 mió. kr. í 2019. Størsti parturin av óbrúktu trekningsrættunum skal brúkast til at fíggja íløgur komandi árini. Neyðugt er at hava eitt trygt gjaldføri

**Talva 6**
**ÍLØGUR, MIÓ. KR.**

| | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Koplingarstøðir | 51,5 | 61,2 |
| Net | 101,0 | 59,2 |
| Fyrisitingarbygningur, amboð, KT-útgerð | 25,7 | 14,1 |
| **Tilsaman** | **178,2** | **134,4** |

**Talva 7**
**ÍLØGUR, MIÓ. KR.**

| | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 163,7 | 122,9 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd | 14,6 | 11,6 |
| **Íløgur við ársenda** | **178,2** | **134,4** |

**Talva 8**
**ARBEIÐI Í GERÐ, MIÓ. KR.**

| | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Salda við ársbyrjan | 140,8 | 167,9 |
| Íløgur bókaðar til arbeiði í gerð | 163,7 | 122,9 |
| Arbeiðir førd til avskrivingar sum tilgongd | -139,5 | -150,0 |
| **Salda við ársenda** | **165,0** | **140,8** |
| Broyting í arbeiði í gerð | 24,1 | -27,1 |

**Talva 9**
**TILGONGD TIL STØÐISOGN, MIÓ. KR.**

| | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Arbeiði førd til avskrivingar sum tilgongd | 139,5 | 150,0 |
| Beinleiðis bókaðar íløgur sum tilgongd á støðisogn | 14,6 | 11,6 |
| **Tilgongd við ársenda** | **154,1** | **161,5** |



**Talva 10**
**STØRSTU ÍLØGURNAR Í KOPLINGAR-STØÐIR OG NET**

| | 2020 |
|---|---|
| Koplingarstøð Vestmanna | 23,7 |
| 60 og 20 kV kaðal Eysturoyartunnil | 11,8 |
| 60 kV kaðal Norðoyatunnilin | 11,7 |
| 60 og 10 kV kaðal Hvalbiartunnilin | 11,6 |
| 20 kV koplingarstøð Sund | 10,1 |
| 60 og 10 kV kaðal Klaksvík - Strond | 8,9 |
| 60 og 20 kV kaðal Leirvíkstunnilin | 8,8 |
| Pumpuskipan Vestmanna | 7,3 |
| Koplingarstøð Porkerishálsur | 4,9 |
| 20 og 10 kV kaðal Vágur - Tvøroyri | 4,8 |
| **Tilsaman** | **103,7** |

**Talva 11**
**STØRSTU TILGONGDIRNAR TIL AVSKRIVING**

| | 2020 |
|---|---|
| Umsitingarbygningur | 33,8 |
| 60 og 20 kV kaðal Eysturoyartunnilin | 26,9 |
| 20 kV koplingarstøð Sund | 16,9 |
| Fjarstýringsskipan | 12,9 |
| 60 og 10 kV kaðal Hvalbiartunnilin | 11,6 |
| **Tilsaman** | **102,2** |

**Talva 12**
**ÍLØGUR Í KAÐALAR V.M. EFTIR ØKI**

| | 2020 |
|---|---|
| Felags | 8,5 |
| Norðuroyggjar | 2,8 |
| Eysturoy | 16,7 |
| Vágoy | 2,0 |
| Norðurstreymoy | 0,2 |
| Suðurstreymoy | 17,1 |
| Sandoy | 1,2 |
| Suðuroy | 4,6 |
| **Tilsaman** | **50,1** |

til dagliga raksturin av felagnum, eins og tað verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikum á fíggjarmarknaðunum kring heimin.

Endamálið er at hava eitt munagott gjaldføri soleiðis, at SEV altíð er ført fyri kontant at rinda fyri eitt oljukeyp og kostnaðin av einum óhappi á einum av framleiðsluverkunum, ella á netinum. Harumframt er neyðugt at hava eitt trygt gjaldføri til dagliga raksturin av framleiðsluverkunum og av netinum. Eisini verður mett skilagott at hava eitt munagott gjaldføri við atliti at ótryggleikum á fíggjarmarknaðunum kring heimin. Nærri lýsing av gjaldførinum er at finna í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

## VÁÐAVIÐURSKIFTI

Váðaviðurskifti hjá felagnum kunnu greinast í ymiskar bólkar: Nærri lýsing av váðaviðurskiftunum er at finna í samtaksroknskapinum, sum sæst á www.sev.fo.

## ÚTLIT FYRI RAKSTRARÁRIÐ 2021

Úrslitið áðrenn skatt fyri 2021 er eitt ætlað yvirskot umleið 30-40 mió. kr. við støði í fyriliggjandi ætlan fyri 2021 og eftir meting av býtinum av úrslitinum í mun til eginpeningskravið.

Roknað verður við, at privatu kundar felagsins hava eina framgongd upp á 2% í nýtsluni í 2021. Aðrir kundabólkar liggja millum 1% og 3% í framgongd. Tó verður ætlað við eini framgongd innan kundabólkin fyri "handil, matstovu og gistingarhús" við 4,0%. Hinvegin verður roknað við framhaldandi afturgongd fyri gøtuljós. Fyri 2021 er ætlað við eina afturgongd í gøtuljósum.

Við støði í søluni fyri 2019 og partvíst í 2020, er ætlað við eini sølu í 2021 upp á 374 GWt, og eini nettosølu upp á 548 mió. kr. Við hesum økist nettosølan umleið 8 mió. kr.

SEV hevur stovnað sjálvstøðug dótturfeløg at umsita vindmyllulundirnar í ávikavist Neshaga og Húsahaga. Hetta viðførir, at keyp av vindorku er økt, samstundis sum kostnaður av tilfari og lønum, avskrivingum og rentum er lækkaður. Úrslitið frá dótturfeløgum verður tikið inn í roknskapin

gjøgnum úrslit av kapitalpørtum. Samlaða úrslitið hjá SEV ávirkast ikki.

Rakstrarútreiðslurnar verða mettar at verða 76 mió. kr. í 2021 móti 77 mió. kr. í 2020, svarandi til eina lægri útreiðslu á 1 mió. kr. Ætlað er við avskrivingum upp á 61 mió. kr. og rentuútreiðslum upp á 34 mió. kr. Avskrivingar og rentuútreiðslur økjast grundað á íløgurnar felagið ger og lántøku fyri at fíggja hesar.

Við einum mettum yvirskoti í 2021 sum, samanumtikið verður mett at vera nøktandi, luttekur raksturin fyri netpartin við einari eginfígging til íløgur. Tað er neyðugt at hava eitt nøktandi úrslit, og harvið eina nøktandi eginfígging frá rakstrinum, sum skal vera við til at fíggja komandi íløgur í koplingarstøðir og viðlíkahald av verandi neti, eins og íløgur í menningini av netinum skal gerast, fyri at taka ímóti alsamt vaksandi partinum av elmegi frá varandi orkukeldum og veita hesa víðari til viðskiftafólk felagsins.

Nærri lýsing av 2021 sæst í Rakstrar-, fíggjar- og íløguætlan felagsins fyri 2021 á www.sev.fo

**HENDINGAR EFTIR ROKNSKAPARLOK**
Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum ávirkar metingina av ársfrásøgnini.



# Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Elfelagið SEV er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri stór feløg í flokki C.

Netroknskapurin er gjørdur upp sum ein samtaksroknskapur uttan útjavnan av innanhýsis bókingum í rakstri og javna. Hetta fyri at geva lesaranum so góða kunning sum gjørligt um alt netvirksemi hjá SEV-samtakinum. Annars er ársfrásøgnin gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m., verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

Har sum talvur í roknskapinum vísa tøl avrundaði til heilar túsund ella millión krónur, og talvan inniheldur samanburðartøl millum ár víst sum munur í krónum ella prosentum, eru samanburðartølini roknaði upp á undirliggjandi tølini og síðani avrundað. Tískil kann koma fyri, at smærri munir eru millum avrundaðu tølini, sum víst verða í talvuni, og útroknaðu samanburðartølini í talvuni.

**ALMENT UM INNROKNING OG VIRÐISÁSETING**
Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

**UMROKNING AV FREMMANDUM GJALDOYRA**
Handlar í fremmandum gjaldoyra verða umroknaðir til kursin, sum er galdandi á handilsdegnum. Gjaldoyrakursmunir, millum handilsdagin og gjaldsdagin, verða innroknaðir í rakstrarroknskapin sum ein fíggjarpostur.

Áogn, skuld og aðrir peningaligir postar í fremmandum gjaldoyra, sum ikki eru avroknaðir við roknskaparlok, verða umroknaðir til gjaldoyrakursin við roknskaparlok. Munurin millum gjaldoyrakursin við roknskaparlok og kursin, ið var galdandi á upptøkudegnum, verður innroknaður í rakstrarroknskapin undir fíggjarpostum.

**RAKSTRARROKNSKAPURIN**

**NETTOSØLA**
Nettosøla verður innroknað í rakstrarroknskapin, um veiting og váði eru farin til keypara innan roknskaparlok, og inntøkan er álítandi uppgjørd og væntast at koma inn. Nettosølan verður innroknað uttan meirvirðisgjald, avgjøld og eftir at avsláttur í samband við søluna er frádrigin.

**VØRUNÝTSLA**
Vørunýtsla umfatar kostnaðir til keyp av rávørum og hjálpartilfari, frádrigið avsláttur og goymslubroyting í árinum.

**AÐRIR UTTANHÝSIS KOSTNAÐIR**
Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata keyp av olju, tilfari og øðrum tænastuveitingum, umframt annan fyrisitingarkostnað.

**SKIPANARBERANDI TÆNASTUR OG BÝTI AV INNTØKUM**
Samlaði kostnaðurin hjá elverkunum kemur av kostnaðinum í sambandi við at framleiða elmegi, umframt kostnaðin av skipanarberandi tænastum. Skipanarberandi tænastur umfata tilrættislegging og stýring av tøkum mátti, rullandi mátti, reaktivum mátti, spenningsregulering og frekvensregulering. Kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastunar er ein ásett meting av samlaða rakstrarkostnaðinum á Sunds- og Vágsverkinum.

Kostnaðurin fyri skipanarberandi tænastur kring landið annars er grundaður á kostnaðin hjá smáverkunum. Smáverkini fáa rakstrarkostnaðin fyri tilfar og løn endurgoldnan fyri veitingartrygd. Restin sum eginframleiðsla. Elverkið á Strond fær rakstrarkostnaðin fyri tilfar og løn fyri termiska framleiðslu av elmegi endurrindaðan sum veitingartrygd. Restin av kostnaðinum kemur frá eginframleiðslu.

Inntøkur hjá framleiðsluverkum eru ásettar at samsvara við samlaða kostnaðin hjá elverkunum, umframt at ein vinningur av framleiðsluni av primo eginognini er innroknaður. Roknaði vinningurin er ásettur við støði í avkasti av langfreistaðum realkredittlánsbrøvum og virðisrøkt av ognum hjá framleiðslupartinum.

**STÝRING AV ELSKIPANINI**
Kostnaðurin fyri tilrættisleggingina og stýringina av elskipanini í meginøkinum er uppgjørdur sum samlaður kostnaður fyri lønir á Fossáverkinum, frádrigið kostnaðin fyri lønir til vanligan rakstur av verkinum. Kostnaðurin fyri stýringina av elskipanini í Suðuroy verður gjørdur upp á sama hátt, tó grundað á lønirnar á Vágsverkinum.

**BÝTI AV INNTØKUM**
Sambært Elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur.

Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging.

SEV hevur mett, at ein eginfígging upp á 25% er nøktandi, og hevur í roknskapinum tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslu- og netpartin.

Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin fyri eitt 5 ára tíðarskeið, sum er inniverandi ár og næstu 4 árini. Eginfíggingin fyri innniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstur minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið upp á 25% fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur, netparturin hevur umframt eina eginfígging upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin. Um samlaða úrslitið fyri samtakið er størri enn úrslitið fyri netpartin, verður hesin partur av úrslitinum fluttur til framleiðslupartin.

**STARVSFÓLKAKOSTNAÐIR**
Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum verða móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**AV- OG NIÐURSKRIVINGAR**
Av- og niðurskrivingar umfata av- og niðurskrivingar í árinum av immateriellari og materiellari støðisogn.

**FÍGGJARPOSTAR**
Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

Órealiseraður rentukostnaður í samband við prístrygging.

Vinningsbýti frá kapitalpørtum í assosieraðum feløgum verður inntøkuført í tí roknskaparári, sum vinningsbýti verður samtykt.

Rentukostnaðir og aðrir kostnaðir av lánum til at fíggja framleiðslu av immateriellari og materiellari støðisogn, og sum viðvíkja framleiðslutíðarskeiðinum, verða ikki innroknaðir í útveganarvirðið av støðisognini.

**INNTØKUR AV KAPITALPØRTUM Í ATKNÝTTUM FELØGUM**
Í rakstrarroknskapi móðurfelagsins verður tann lutfalsligi parturin av úrslitinum eftir skatt hjá atknýtta felagnum innroknaður eftir eliminering av innanhýsis vinningi ella tapi.

**FÍGGJARSTØÐAN**

**MATERIELL STØÐISOGN**
Materiell støðisogn verður virðisásett til útveganarvirði, frádrigið samlaðar avskrivingar og niðurskrivingar. Grundøki verða ikki avskrivað.

Avskrivingargrundarlagið umfatar útveganarvirðið við frádrátti av væntaðum restvirði eftir lokna brúkstíð.

Útveganarvirðið umfatar keypsprísin og kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini, til ognin er klár at taka í nýtslu.

Avskrivað verður javnt yvir væntaðu brúkstíðirnar og restvirðunum hjá ognunum:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Framleiðslu og býtisvirkir | 10-50 ár | 0 % |
| Bygningar | 50 ár | 0 % |
| Rakstrargøgn | 3-5 ár | 0 % |

Smáamboð við eini væntaðari livitíð á undir 1 ár verða útreiðsluførd í útveganarárinum. Viðvíkjandi eginframleiddum ognum fevnir útveganarvirðið um kostnaðir av tilfari, lutum, undirveitarum, beinleiðis lønarkostnaði og óbeinleiðis framleiðslukostnaði.

**NIÐURSKRIVING AV STØÐISOGN**
Hvørt ár verða roknskaparligu virðini á materiellari støðisogn mett fyri at fáa ábending um, hvørt tey eru minkað í virði. Hetta kemur afturat vanligu avskrivingini.

Eru ábendingar um virðisminking, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðum nettoinntøkum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

**FÍGGJARLIG STØÐISOGN**

**KAPITALPARTAR Í ASSOSIERAÐUM FELØGUM**
Kapitalpartar í assosieraðum feløgum verða virðisásettir til útveganarvirði. Er nettorealisatiónsvirðið lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

**VØRUGOYMSLUR**
Vørugoymslur verða virðisásettar til útveganarvirði eftir FIFOháttinum. Um nettorealisatiónsvirðið av vørugoymslunum er lægri enn útveganarvirðið, verður niðurskrivað til lægra virðið.

Útveganarvirðið á handilsvørum umframt rávørum og øðrum hjálpartilfari umfatar keypsprís umframt flutningsgjald.

Útveganarvirðið av framleiddum liðugvørum og vørum í gerð umfatar útveganarvirði av rávørum, hjálpartilfari, beinleiðis lønarkostnaðum og óbeinleiðis framleiðslukostnaðum. Óbeinleiðis framleiðslukostnaðir umfata óbeinleiðis tilfar og løn umframt viðlíkahald og avskrivingar av maskinum, virkisbygningum og útgerð, ið verður nýtt í framleiðsluni. Harumframt umfatar posturin kostnaðir til at leiða og fyrisita framleiðsluna, umframt ognarførdan menningarkostnað, ið viðvíkur vøruni.

**ÁOGN**
Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**TÍÐARAVMARKINGAR**
Tíðaravmarkingar, sum eru innroknaðar undir ogn, umfata staðfestar kostnaðir, sum viðvíkja komandi roknskaparári.

**TØKUR PENINGUR**
Tøkur peningur umfatar tøkan pening og stuttfreistaði virðisbrøv, ið hava eina lánitíð undir 3 mánaðir, og sum uttan forðingar kunnu umsetast til tøkan pening, og har tað bara er ótýðandi váði fyri virðisbroytingum.

**PARTAFELAGSSKATTUR OG ÚTSETTUR SKATTUR**
Skyldugur skattur og skattaáogn verða innroknað í fíggjarstøðuna við teirri upphædd, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatt frá undanfarnum árum. Skyldugur skattur og skattaáogn verða víst mótroknað í tann mun, at hetta er í samsvari við lógina, og at postarnir væntandi verða avroknaðir netto ella samstundis.

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av ognum og skyldum. Hetta verður uppgjørt við støði í ætlaðu nýtsluni av ognini, ella hvussu skyldan ætlandi verður afturgoldin.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum hallum, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri, antin við at javna í skatti av framtíðarinntøkum ella við at mótrokna útsetta skattaskyldu innan fyri somu løgfrøðiligu skattaeind. Møgulig útsett nettoskattaáogn verður tikin við til nettorealisatiónsvirðið.

Útsettur skattur verður virðisásettur við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi við roknskaparlok.

Broytingar í útsetta skattinum, sum standast av broytingum í skattasatsum, verða innroknaðar í rakstrarroknskapin.

**AÐRAR AVSETTAR SKYLDUR**
Avsettar skyldur umfata væntaðar kostnaðir av ábyrgdarskyldum, tap upp á arbeiði í gerð, umskipanir v.m. Avsettar skyldur verða innroknaðar, tá felagið hevur eina rættarliga ella ítøkiliga skyldu orsakað av einari hending, sum hevur verið, og tað er sannlíkt, at skyldan verður avgreidd við at brúkt verður av fíggjarligu ognunum hjá felagnum.

Avsettar skyldur verða virðisásettar til nettorealisatiónsvirði ella til dagsvirði, tá tað er væntandi, at skyldan skal avgreiðast í fjarari framtíð.

**AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ**
Felagið nýtir avleidd fíggjarlig amboð til at tryggja gjaldoyraváða, oljuprísváða og rentuváða.

Avleidd fíggjarlig amboð verða upprunaliga innroknað til dagsprís, og beinleiðis transaktiónskostnaðir verða innroknaðir í raksturin. Aftaná upprunaligu innrokningina verða avleidd fíggjarlig amboð innroknað til dagsprís, og broytingar í virðinum verða innroknaðar sum greitt frá í tí fylgjandi. Felagið hevur ikki handilslig avleidd fíggjarlig amboð.

Handilslig avleidd fíggjarlig amboð verða roknað sum stuttfreistað ogn ella skuld. Dagsvirði av einari trygging verður roknað sum langfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er longri enn 12 mánaðir og, sum stuttfreistað ogn ella skuld, um tryggingartíðarskeiðið er styttri enn 12 mánaðir.

**GJALDFØRISTRYGGING**
Broytingar í dagsprísi á avleiddum tryggingaramboði nýtt til gjaldføristrygging verða innroknaðar beinleiðis í eginognina í tann mun, tryggingin er effektiv. Í tann mun at tryggingin er óeffektiv, verða broytingar í dagsprísi innroknaðar í vinning ella tap.

Um tryggingaramboðið ikki longur lýkur treytirnar fyri innrokning av trygging, gongur út ella verður selt, verður uppsagt ella nýtt, heldur innrokningin uppat. Akkumuleraður vinningur ella tap innroknað í eginognina verður verandi har, inntil ætlaða transaktiónin fer fram. Tá tryggjaða upphæddin viðvíkur eini ikki-fíggjarligari ogn, verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til bókaða virðið á ognini. Í øðrum førum verður upphæddin innroknað í eginognina flutt til vinning ella tap í tí tíðarskeiði, sum tryggjaða ognin hevur við sær vinning ella tap.

**SKULD**
Í sambandi við lántøku verður fíggjarlig skuld innroknað til útveganarvirðið, svarandi til móttiknu upphæddina eftir frádrignan handilskostnað.

Eftirfylgjandi tíðarskeið verður fíggjarlig skuld innroknað til amortiserað útveganarvirðið, sum svarar til kapitaliseraða virðið við effektivu rentuni, soleiðis at munurin millum móttiknu upphæddina og áljóðandi virðið, verður innroknaður í rakstrarroknskapin yvir lánitíðarskeiðið.

Skuld til realkredittstovnar og peningastovnar verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum svarar til restskuldina, tá talan er um kontantlán. Viðvíkjandi lánsbrævalánum verður amortiserað útveganarvirði roknað sum kontantvirði á lánsupptøkudegnum, javnað við gjørdum avskrivingum í avdráttartíðarskeiðnum av kursjavningini av láninum á upptøkudegnum.

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

**PENINGASTREYMSUPPGERÐ**
Peningastreymsuppgerðin verður uppsett eftir óbeinleiðis háttinum og vísir peningastreymar frá rakstri, íløgum, fígging, broyting í peningastreymum og tøkan pening við ársbyrjan og enda.

Peningastreymar frá rakstri eru tillagaðir fyri ikki likvidar rakstrarpostar, broyting í rakstrarkapitali og goldnan skatt.

Peningastreymar frá íløgum umfata keyp og sølu av immateriellari, materiellari og fíggjarligari støðisogn mótroknað broytingum í áogn og skuld viðvíkjandi nevndu postunum.

Peningastreymar frá fígging umfata fígging frá eigara, goldnum vinningsbýti til eigara og upptøku av láni og avdráttir av langfreistaðari skuld, umframt trekk upp á kassakredittir.

Tøkur peningur við ársbyrjan og enda er kassapeningur og innistandandi í peningastovnum.



# Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember

**Upphæddir í t.DKK**

| Nota | | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| 1 | Nettosøla | 553.407 | 511.096 |
| | Keyp av streymi | -346.502 | -307.456 |
| | Keyp av vind- og biogassorku | -3.805 | -2.338 |
| | Søla av streymi til framleiðslu hjá SEV (eginnýtsla) | 11.743 | 0 |
| | Skipanarberandi tænastur | -23.070 | -20.781 |
| 2 | Oljuútreiðslur | -169 | -190 |
| 3 | Tilfar og tænastuveitingar | -33.818 | -29.867 |
| | **Bruttovinningur** | **157.785** | **150.466** |
| | | | |
| 4 | Starvsfólkaútreiðslur | -43.301 | -42.768 |
| | **Úrslit áðrenn av- og niðurskrivingar** | **114.484** | **107.697** |
| | | | |
| | Av- og niðurskriving av materiellari støðisogn | -49.133 | -44.430 |
| | **Úrslit áðrenn fíggjarpostar** | **65.351** | **63.268** |
| | | | |
| 5 | Fíggjarútreiðslur | -23.290 | -19.977 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **42.061** | **43.291** |
| | | | |
| 6 | Skattur av ársúrsliti | -11.779 | -13.043 |
| | **Ársúrslit** | **30.283** | **30.247** |
| | | | |
| | Uppskot til býti av ársúrsliti: | | |
| | Flutt úrslit | 31.839 | 29.660 |
| | Tiltaksgrunnur fyri nettouppskriving eftir innanvirðisháttinum | -1.557 | 587 |
| | **Til nýtslu** | **30.283** | **30.247** |

# Fíggjarstøða 31. desember

OGN í t.DKK

| Nota | | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| 7, 18 | Býtisvirkir | 790.346 | 713.767 |
| 7 | Bygningar og jarðarøkir | 79.709 | 48.175 |
| 7 | Rakstrargøgn | 38.929 | 42.097 |
| 7 | Íløguarbeiði í gerð | 164.980 | 140.841 |
| | **Materiell støðisogn tilsamans** | **1.073.964** | **944.880** |
| | | | |
| 8 | Kapitalpartar í assosieraðum og atknýttum virkjum | 33.000 | 36.704 |
| 9 | Lán veitt dóttirfeløgum | 69.809 | 78.428 |
| 10 | Avleidd fíggjarlig amboð | 14.989 | 22.111 |
| | **Fíggjarlig støðisogn tilsamans** | **117.798** | **137.243** |
| | **Støðisogn tilsamans** | **1.191.762** | **1.082.122** |
| | | | |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Tilfar | 17.087 | 21.870 |
| | **Vørugoymslur tilsamans** | **17.087** | **21.870** |
| | | | |
| 11 | Vøru- og tænastuáogn | 109.222 | 106.894 |
| | Millumrokning framleiðsla | 163.909 | 113.862 |
| | Tíðaravmarkingar | 16.264 | 9.020 |
| | **Áogn tilsamans** | **289.395** | **229.775** |
| | Tøkur peningur | 223.854 | 125.123 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **530.336** | **376.769** |
| | **Ogn tilsamans** | **1.722.098** | **1.458.891** |

# Fíggjarstøða 31. desember

SKYLDUR í t.DKK

| Nota | | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 12 | Innskot | 4.140 | 4.140 |
| | Grunnur til avleidd fíggjaramboð | -42.170 | -21.240 |
| | Grunnur til uppskriving eftir innaravirðishátti | 1.250 | 4.954 |
| | Flutt úrslit | 600.276 | 568.436 |
| | **Eginogn tilsamans** | **563.496** | **556.291** |
| | | | |
| | **Avsettar skyldur** | | |
| | Avsett til eftirløn og líknandi skyldur | 20.155 | 19.598 |
| | Útsettur skattur | 2.734 | 1.419 |
| | **Avsettar skyldur tilsamans** | **22.890** | **21.017** |
| | | | |
| | **Skuld** | | |
| 13 | Skuld til peningastovnar | 974.702 | 782.836 |
| | **Langfreistað skuld tilsamans** | **974.702** | **782.836** |
| | | | |
| 13 | Stuttfreistaður partur av langfreistaðari skuld | 870 | 870 |
| | Skuld til peningastovnar | 0 | 7 |
| | Tíðaravmarkingar | 1.239 | 1.199 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 47.415 | 34.241 |
| 10 | Avleidd fíggjarlig amboð | 91.020 | 42.160 |
| | Onnur skuld | 20.467 | 20.269 |
| | **Stuttfreistað skuld tilsamans** | **161.011** | **98.747** |
| | **Skuld tilsamans** | **1.135.713** | **881.583** |
| | **Skyldur tilsamans** | **1.722.098** | **1.458.891** |
| | | | |
| **14** | **Netúrslit á økir** | | |
| **15** | **Netyvirlit** | | |
| **16** | **Veðsetingar og aðrar skyldur** | | |

# Peningastreymsuppgerð

| Nota | Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|
| | **Ársúrslit** | **30.283** | **30.247** |
| 16 | Reguleringar | 80.498 | 77.450 |
| | | | |
| | **Broyting í rakstrarpeningi:** | | |
| | Vørugoymslur | 4.782 | -2.060 |
| | Áogn | -39.853 | -21.480 |
| | Vøru- og tænastuskuld | 13.174 | -20.884 |
| | Millumrokning framleiðsla | -50.047 | -102.810 |
| | Onnur rakstrarskuld | 31.075 | 12.816 |
| | **Peningastreymar frá rakstri áðrenn fíggjarligar postar** | **69.912** | **-26.722** |
| | Goldin rentukostnaður og líknandi kostnaðir | -21.733 | -20.564 |
| | Javning fyri swap o.a. reguleringar í rentuútreiðslum | 6.039 | 7.617 |
| | **Peningastreymar frá rakstrinum** | **54.218** | **-39.669** |
| | Keyp av materiellari støðisogn | -154.079 | -161.507 |
| | Broyting arbeiði í gerð | -24.139 | 27.081 |
| | **Peningastreymar frá íløgum** | **-174.514** | **-134.426** |
| | Lántøka netto | 210.415 | 100.000 |
| | Tíðaravmarking av lánirentu | -7 | 1 |
| | Goldnir avdráttir frá framleiðslu | 8.619 | 8.431 |
| | Øking í trekk upp á kassakreditt | 0 | 0 |
| | **Peningastreymar frá fígging** | **219.027** | **108.433** |
| | **Samlaðir peningastreymar í árinum** | **98.731** | **-65.662** |
| | Tøkur peningur við ársbyrjan | 125.123 | 190.785 |
| | **Tøkur peningur við árslok** | **223.854** | **125.123** |





Netroknskapur 2020

# Notur



# Nota 1

## 1. NETTOSØLA

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| kWt gjald o.a. | 522.833 | 469.997 |
| Fast gjald | 18.039 | 17.381 |
| Íbinding | 11.187 | 24.014 |
| Ómaksgjøld, áminning, onnur søla og javning til kWt-sølu | 1.348 | -295 |
| **Tilsamans** | **553.407** | **511.096** |

**BÝTI AV AVLOP Í RAKSTRI**

Í 2011 fór SEV undir at gera sjálvstøðugar roknskapir fyri framleiðslu- og netpartarnar. Í hesum sambandi hevur felagið tikið hædd fyri at rokna vinning í framleiðslupartinum á sama hátt, sum kravt er í sambandi við vindorkuútboðini. Innrokningin av vinningi er fyri at geva eina rættvísandi mynd av rakstrinum hjá framleiðslupartinum, sæð í mun til avkastkrav og virðisrøkt av ognunum hjá framleiðslupartinum.

Fyri framleiðslupartin merkir hetta, at hesin skal hava allan sín kostnað rindaðan, íroknað kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur. Harumframt miðar framleiðsluparturin eftir at hava eitt yvirskot svarandi til umleið 5% av primoeginpeninginum.

Roknaða kravið til vinningin í 2020 er 39,4 mió. kr. móti 38,0 mió. kr. í 2019, svarandi til 5,0% av primoeginpeninginum hjá framleiðslupartinum. 5% í vinningi metur SEV er eitt rímiligt avkast í løtuni í mun til inflasjón og aðrar íløgumøguleikar. Samlaða úrslitið fyri framleiðslupartin gjørdist 18,0 mió. kr.

Sambært Elveitingarlógini skal netvirksemið fíggjarliga hvíla í sær sjálvum soleiðis, at inntøkurnar eru hóskandi til at gjalda fyri rakstur og ætlaðar neyðugar íløgur. Fyri netpartin merkir hetta, at hesin skal hava eina inntøku svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur soleiðis, at netparturin kann gjalda fyri raksturin umframt, at netparturin skal hava inntøkur til at kunna rinda fyri ætlaðar neyðugar íløgur. Inntøkurnar fyri neyðugu íløgurnar taka støði í kravinum til eginfígging. Í sambandi við, at íløgurnar stavandi frá visión 2030 verður gjørdar fyrr enn áður ætlað, kann tað gerast neyðugt at hækka kravið upp á 25% eginfígging.

Tá farið verður undir at gera íløgur, er neyðugt at hava eina ávísa eginfígging soleiðis, at ikki øll íløgan skal fíggjast við lántøku. SEV hevur upprunaliga mett, at ein eginfígging upp á 25% er nøktandi, og hevur í roknskapunum fyri 2016-2020 tikið hædd fyri hesum kravinum í roknskapinum fyri framleiðslupartin og netpartin. Kravið til støddina av eginfíggingini tekur støði í íløgunum á fíggjarætlanini fyri framleiðslupartin og netpartin. Hetta er grundað á at felagið higartil hevur havt ein høgan eginpeningspart. So hvørt sum hesin lækkar verður neyðugt at hækka kravið til eginfígging, frá 25% til 42,5%, sum er innanhýsis eginpeningskravið til eginpeningspartin. Kravið til eginpeningspartin sambært lániavtalur felagsins er 35% (fyrr 37,5%).

Markið skal síggjast í mun til íløgurnar á fíggjarætlanini fyri eitt rullandi 5 ára tíðarskeið. Í fíggjarætlanini fyri 2020 sæst, at íløgurnar fyri 2020-2024 í framleiðslupartinum eru 1.146 mió. kr. Hetta svarar til 229 mió. kr. árliga í miðal. Eginfíggingarparturin fyri 2020 er soleiðis ætlaður til 57 mió. kr.

Fyri netpartin er talan um íløgur fyri 1.079 mió. kr., og er eginfíggingarparturin samsvarandi ætlaður til 54 mió. kr. fyri 2020. Tað er umráðandi, at eginfíggingin er á einum nøktandi støði, og hetta kann bert gerast við avlopi á rakstrinum.

Eginfíggingin fyri inniverandi ár verður roknað soleiðis: peningastreymurin frá rakstri minus kostnað til rentur og avdrátt sett í mun til kravið upp á 25% fyri eginfígging av árligu miðalíløgum næstu 5 árini.

Fyri netpartin merkir hetta, at ársúrslitið verður tillagað soleiðis, at yvirskotið er svarandi til tær útreiðslur netparturin hevur umframt eina eginfígging upp á 25% av árligu miðalíløgunum næstu 5 árini fyri netpartin.

Býtið av yvirskotinum millum framleiðslupartin og netpartin árini framanundan hevur tikið støði í, at tilluta framleiðslupartinum eitt úrslit svarandi til at allur kostnaður er rindaður, íroknað kostnað fyri netumsitingina og netábyrgdina. Harumframt 5% vinning av primoeginpeninginum.

Frameftir verður neyðugt at økja inntøkurnar hjá framleiðslupartinum í mun til netpartin soleiðis, at hesar samsvara við øktu skuldarbyrðuna hjá framleiðslupartinum, sum væntandi kemur av útbyggingum av framleiðsluverkum.

Um samlaða úrslitið fyri samtakið var størri, var hesin parturin av úrslitinum fluttur til netpartin. Hetta er broytt í 2016 við, at tað nú er netparturin, sum hevur eitt tillagað úrslit og ikki framleiðsluparturin.

# Notur 2–5

## 2. OLJUÚTREIÐSLUR

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Gassolja | 169 | 190 |
| **Tilsamans** | **169** | **190** |

## 3. TILFAR OG TÆNASTUVEITINGAR

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Linjur | 3.516 | 2.837 |
| Byrging, rør og tunlar | 2 | 13 |
| Tangar og umhvørvi | 116 | 99 |
| Maskinur | 0 | 1 |
| El og teknikk | 252 | 48 |
| Bygningar og lendi | 1.785 | 1.788 |
| Aðalfundur og nevnd | 149 | 262 |
| Kanning og ráðgeving | 2.325 | 4.639 |
| Kunningartøkni | 7.645 | 6.514 |
| Leiðsla og skrivstovuhald | 2.263 | 2.093 |
| Tap upp á skuldarar | 1.237 | -538 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 372 | 205 |
| Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 14.156 | 11.906 |
| **Tilsamans** | **33.818** | **29.867** |

## 4. STARVSFÓLKAÚTREIÐSLUR

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Lønir | 36.341 | 36.295 |
| Pensjónir | 4.915 | 4.493 |
| Almenn gjøld | 2.045 | 1.979 |
| **Tilsamans** | **43.301** | **42.768** |
| | | |
| Starvsfólk í føstum starvi | 97 | 90 |
| **Ársverk** | **102** | **101** |

## 5. FÍGGJARÚTREIÐSLUR

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Úrslit dóttirfeløg | 1.557 | -587 |
| Rentur, lán og bankaskuld | 17.989 | 17.147 |
| Stovningarkostnaðir, provisiónir | 2.710 | 2.090 |
| Órealiseraður kursvinningur ella -tap | -19.644 | 127 |
| Órealiserað javning á avleidd amboð | 21.636 | 817 |
| Annar rentukostnaður | -957 | 384 |
| **Tilsamans** | **23.290** | **19.977** |

# Notur 6–7

### 6. SKATTUR AV ÁRSÚRSLITI

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Broyting í útsettum skatti | -11.779 | -13.043 |
| **Skattur í árinum sambært rakstrarroknskapi** | **-11.779** | **-13.043** |
| | | |
| Avsett til útsettan skatt 01.01 | -1.419 | -23.981 |
| Javning undanfarin ár | 0 | 23.847 |
| Broyting í útsettum skatti í rakstrarroknskapi | -11.779 | -13.043 |
| Broyting í útsettum skatti avleidd amboð beinleiðis í eginogn | 10.463 | 11.759 |
| Avsett til útsettan skatt 31.12 | -2.734 | -1.419 |
| **Tilsamans** | **11.779** | **13.043** |

### 7. MATERIELL STØÐISOGN

| Upphæddir í t. DKK | Býtisvirkir | Bygningar | Rakstrargøgn | Tils. 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 1.270.493 | 84.570 | 213.047 | 1.568.110 | 1.406.603 |
| Tilgongd í árinum | 111.288 | 34.148 | 10.375 | 155.811 | 162.069 |
| Frágongd í árinum | 0 | 0 | -1.732 | -1.732 | -562 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **1.381.782** | **118.718** | **221.689** | **1.722.189** | **1.568.110** |
| | | | | | |
| Av- og niðurskriving primo | -556.726 | -36.395 | -170.950 | -764.072 | -719.642 |
| Avskrivingar í árinum | -34.709 | -2.614 | -13.542 | -50.866 | -44.991 |
| Afturførdar avskrivingar | 0 | 0 | 1.732 | 1.732 | 562 |
| **Av- og niðurskriving ultimo** | **-591.436** | **-39.009** | **-182.760** | **-813.205** | **-764.072** |
| | | | | | |
| **Roknskaparligt virði ultimo** | **790.346** | **79.709** | **38.929** | **908.984** | **804.039** |
| | | | | | |
| Roknskaparligt virði ultimo 2019 | 713.767 | 48.175 | 42.097 | 804.039 | |
| | | | | | |
| **Arbeiði í gerð** | | | | | |
| Arbeiði í gerð primo | 122.476 | 12.855 | 5.510 | 140.841 | 167.922 |
| Tilgongd til arbeiði í gerð í árinum | 139.919 | 20.963 | 2.778 | 163.660 | 122.871 |
| Liðug arbeiði førd til avskrivingar | -103.976 | -33.818 | -1.727 | -139.521 | -149.952 |
| **Arbeiði í gerð ultimo** | **158.419** | **0** | **6.561** | **164.980** | **140.841** |
| | | | | | |
| Arbeiði í gerð ultimo 2019 | 122.476 | 12.855 | 5.510 | 140.841 | |
| | | | | | |
| **Støðisogn ultimo** | **948.765** | **79.709** | **45.490** | **1.073.964** | **944.880** |
| | | | | | |
| Støðisogn ultimo 2019 | 836.243 | 61.030 | 47.607 | 944.880 | |



# Notur 8–11

### 8. KAPITALPARTAR Í ATKNÝTTUM OG ASSOSIERAÐUM VIRKJUM

| Upphæddir í t. DKK | 31.12.20 | 31.12.19 |
|---|---|---|
| Útveganarvirði primo | 31.750 | 31.750 |
| **Útveganarvirði ultimo** | **31.750** | **31.750** |
| Úrslit dóttirfeløg primo | 4.954 | 4.367 |
| Úrslit dóttirfeløg í árinum | -1.557 | 587 |
| Javning avleidd fíggjarlig amboð í eginogn | -2.147 | 0 |
| Úrslit dóttirfeløg ultimo | 1.250 | 4.954 |
| **Bókað virði ultimo** | **33.000** | **36.704** |

ASSOSIERAÐ OG ATKNÝTT VIRKI:

| Upphæddir í t. DKK | Ognarpartur | Eginogn | Ársúrslit | Innroknað virði |
|---|---|---|---|---|
| P/F Fjarhitafelagið, Tórshavn | 50% | 62.949 | 467 | 2.750 |
| P/F Vindfelagið í Húsahaga | 100% | 20.867 | -406 | 20.867 |
| P/F Vindfelagið í Neshaga | 100% | 9.383 | -3.298 | 9.383 |

Eingin roknskapur hjá P/F Fjarhitafelagnum fyriliggur fyri 2020 - upplýstu tølini eru fyri 2019.

### 9. LÁN VEITT DÓTTIRFELØGUM

| Upphæddir í t. DKK | Áramál | Høvuðs-stólur | Salda 31.12.20 | Avdráttur komandi ár | Salda um 5 ár |
|---|---|---|---|---|---|
| P/F Vindfelagið í Húsahaga | 12 ár | 75.000 | 52.166 | 6.030 | 27.230 |
| P/F Vindfelagið í Neshaga | 10 ár | 28.175 | 17.643 | 2.781 | 6.142 |
| **Tilsamans** | | **103.175** | **69.809** | **8.811** | **33.372** |

### 10. AVLEIDD FÍGGJARLIG AMBOÐ

| Upphæddir í t. DKK | Ogn 31.12.20 | Skuld 31.12.20 | Samlað 31.12.20 | 31.12.19 |
|---|---|---|---|---|
| Prístrygging olja | 0 | -17.318 | -17.318 | 13.407 |
| Prístrygging gjaldoyra | 0 | -35.879 | -35.879 | 7.117 |
| Rentutrygging | 14.989 | -37.822 | -22.833 | -40.573 |
| **Tilsamans** | **14.989** | **-91.020** | **-76.030** | **-20.049** |

Avleidd fíggjarlig amboð eru nýtt at tryggja rentugjaldingar og gjaldoyrakurs á lánum, umframt prísstøði og gjaldoyrakurs á oljukeypi. Virðini í notuni omanfyri koma fram sum munurin millum amboðini á statusdegnum í mun til tað roknaða framtíðarvirði.

### 11. VØRU- OG TÆNASTUÁOGN

| Upphæddir í t. DKK | 31.12.20 | 31.12.19 |
|---|---|---|
| Elskuldarar | 110.044 | 105.948 |
| Aðrir skuldarar | 2.515 | 3.299 |
| Niðurskrivað upp á áogn | -3.338 | -2.353 |
| **Tilsamans** | **109.222** | **106.894** |

# Notur 12–14

### 12. EGINOGN

| Upphæddir í t. DKK | Innskot | Grunnur til avleidd fíggjarambøð | Tiltaksgrunnur til uppskriving innaravirðis-háttur | Flutt úrslit | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| Eginognaruppgerð 01.01.19 - 31.12.19 | | | | | |
| Salda pr. 01.01.19 | 4.140 | -53.840 | 4.367 | 496.656 | 451.323 |
| Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð | 0 | 32.600 | 0 | 0 | 32.600 |
| Rætting útsettur skattur undanfarin ár * | 0 | 0 | 0 | 42.120 | 42.120 |
| Úrslit í dóttirfeløgum | 0 | 0 | 587 | -587 | 0 |
| **Ársúrslit** | **0** | **0** | **0** | **30.247** | **30.247** |
| **Salda pr. 31.12.19** | **4.140** | **-21.240** | **4.954** | **568.436** | **556.291** |
| | | | | | |
| Eginognaruppgerð 01.01.20 - 31.12.20 | | | | | |
| Salda pr. 01.01.20 | 4.140 | -21.240 | 4.954 | 568.436 | 556.291 |
| Broyting í javning avleidd fíggjarlig amboð | 0 | -20.930 | -2.147 | 0 | -23.078 |
| Úrslit í dóttirfeløgum | 0 | 0 | -1.557 | 1.557 | 0 |
| **Ársúrslit** | **0** | **0** | **0** | **30.283** | **30.283** |
| **Salda pr. 31.12.20** | **4.140** | **-42.170** | **1.250** | **600.276** | **563.496** |

* Grundað á umflokking av skattligum saldum millum rakstrargøgn og bygningar viðvíkjandi undanfarnum árum er neyðugt at rætta útsettan skatt fyri tíðarskeiðið fram til 31.12.2018. Hetta er gjørt við at rætta 42,1 mió. kr. í eginognini í árinum 2019.

### 13. SKYLDUR

| Upphæddir í t. DKK | Skyldug renta | Avdráttur fyrsta árið | Restskuld eftir 5 ár | Skuld tilsamans 31.12.20 | Skuld tilsamans 31.12.19 |
|---|---|---|---|---|---|
| Skuld til fíggjarstovnar | 870 | 0 | 974.702 | 974.702 | 782.836 |
| **Tilsamans** | **870** | **0** | **974.702** | **974.702** | **782.836** |

Eingin avdráttur er fyrsta árið, og verandi lániavtala fellur til gjaldingar innan í miðal 6,3 ár.

### 14. NETÚRSLIT Á ØKIR

| Upphæddir í t. DKK | Inntøkur | Olja | Tilfar | Lønir | Avskriving | Rentur | Skattur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Koplingarstøðir | -929 | 0 | -1.326 | -16 | -11.159 | 0 | 0 | -13.430 |
| Býtisvirkir | -804 | -169 | -7.610 | -14.131 | -25.460 | 0 | 0 | -48.173 |
| Innlegging | 692 | 0 | -2.233 | -5.869 | -3.121 | 0 | 0 | -10.531 |
| Verkfrøði | 56 | 0 | -541 | -4.296 | -1.654 | 0 | 0 | -6.435 |
| Tøkni | 0 | 0 | -601 | -1.802 | -213 | 0 | 0 | -2.617 |
| Net uttan fyrisiting | -985 | -169 | -12.311 | -26.114 | -41.607 | 0 | 0 | -81.186 |
| Fyrisiting | 192.758 | 0 | -21.507 | -17.187 | -7.526 | -23.290 | -11.779 | 111.469 |
| **Netúrslit** | **191.773** | **-169** | **-33.818** | **-43.301** | **-49.133** | **-23.290** | **-11.779** | **30.283** |



# Nota 15

### 15. NETYVIRLIT

| | Fugloy | Svínoy | Viðoy | Borðoy | Kunoy | Kalsoy | Eysturoy | Vágoy | Streymoy | Mykines | Nólsoy | Koltur | Hestoy | Sandoy | Skúvoy | Stóra Dímun | Suðuroy | Tilsamans | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **TRANSFORMARASTØÐIR** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV | 1 | | | 1 | | | | | | | | | | | | | | 2 | stk. |
| 10kV | | 1 | 9 | 40 | 4 | 8 | | | 84 | | 1 | | | 28 | | | 54 | 229 | stk. |
| 20kV | | | | 3 | | | 136 | 37 | 117 | | | | 1 | | | | 18 | 312 | stk. |
| 60kV | | | | 2 | | | 4 | | 6 | | | | | | | | | 12 | stk. |
| **Samtal økir** | **1** | **1** | **9** | **46** | **4** | **8** | **140** | **37** | **207** | | **1** | | **1** | **28** | | | **72** | **555** | **stk.** |
| **TRANSFORMARAR** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 6kV | 2 | | | 2 | | | | | | | | | | | | | | 4 | stk. |
| 10kV | | 1 | 13 | 57 | 4 | 8 | | | 101 | | 1 | | | 31 | | | 76 | 292 | stk. |
| 20kV | | | | 4 | | | 181 | 55 | 167 | | | | 1 | 3 | | | 23 | 434 | stk. |
| 60kV | | | | 4 | | | 7 | | 18 | | | | | | | | | 29 | stk. |
| **Samtal økir** | **2** | **1** | **13** | **67** | **4** | **8** | **188** | **55** | **286** | | **1** | | **1** | **34** | | | **99** | **759** | **stk.** |
| **KAÐALSKÁP** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 0,4kV | 15 | 26 | 87 | 526 | 32 | 34 | 1.665 | 552 | 2.488 | 7 | 38 | | 10 | 230 | 11 | 1 | 897 | 6.619 | stk. |
| **LINJUR OG KAÐALAR** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| 60kV linja | | | | 1,1 | | | 37,8 | | 37,9 | | | | | | | | | 76,8 | km |
| 60kV kaðal | | | | 18,4 | | | 42,2 | | 43,4 | | | | | | | | | 104,1 | km |
| 20kV linja | | | | | | | 32,2 | 0,6 | 46,7 | | | | | | | | 9,6 | 89,1 | km |
| 20kV kaðal | | | | 11,6 | | | 256,6 | 57,8 | 189,2 | | | | 0,6 | 0,6 | | | 32,9 | 549,1 | km |
| 10kV linja | | 3,1 | 10,0 | 11,0 | 5,4 | 0,3 | | | 1,1 | | | | | | | | 17,2 | 48,1 | km |
| 10kV kaðal | | 0,6 | 21,5 | 47,6 | 6,4 | 17,8 | | | 98,7 | | 1,5 | | | 49,3 | | | 74,2 | 317,5 | km |
| 6kV linja | 2,2 | | | 6,2 | | | | | | | | | | | | | | 8,4 | km |
| 6kV kaðal | 0,2 | | | 0,0 | | | | | | | | | | | | | | 0,2 | km |
| 0,4kV linja | | | | | | | | | | | | | | | | | | 0,0 | km |
| 0,4kV kaðal | 1,1 | 4,2 | 11,9 | 68,2 | 3,5 | 3,9 | 220,4 | 68,1 | 316,9 | 0,5 | 3,4 | 0,4 | 0,9 | 30,5 | 0,9 | 0,1 | 108,3 | 843,2 | km |
| **MÁLARAR** | | | | | | | | | | | | | | | | | | | |
| Fjaravlisnir | 64 | 80 | 292 | 2.609 | 89 | 132 | 5.638 | 1.679 | 11.419 | 57 | 177 | 4 | 43 | 845 | 54 | 5 | 2.944 | 26.131 | stk. |
| Ikki fjaravlisnir | 0 | 0 | 0 | 5 | 0 | 1 | 6 | 4 | 19 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 0 | 0 | 8 | 44 | stk. |
| **Málarar tils. /øki** | **64** | **80** | **292** | **2.614** | **89** | **133** | **5.644** | **1.683** | **11.438** | **57** | **177** | **4** | **43** | **846** | **54** | **5** | **2.952** | **26.175** | **stk.** |
| Vøkstur 2020 | 1 | 0 | 3 | 17 | 1 | 2 | 54 | 25 | 127 | 1 | -2 | 0 | 0 | 5 | 0 | 0 | 10 | 244 | stk. |

# Notur 16–18

### 16. VEÐSETINGAR OG AÐRAR SKYLDUR

Víst verður til ársfrásøgnina hjá Elfelagnum SEV, har veðsetingar og aðrar møguligar skyldur framganga.

### 17. REGULERINGAR

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Úrslit dótturfeløg | 0 | -587 |
| Rentukostnaðir | 19.741 | 19.621 |
| Órealiseraðir rentukostnaðir og javning av fíggjarligum amboðum | 1.992 | 943 |
| Avskrivingar | 49.133 | 44.430 |
| Javning rentuswappur dótturfelag yvir kapitalpartar og eginogn | -2.147 | 0 |
| Skattur | 11.779 | 13.043 |
| **Tilsamans** | **80.498** | **77.450** |

### 18. ÚTGREINING STØÐISOGN BÝTISVIRKIR

| Upphæddir í t. DKK | 2020 | 2019 |
|---|---|---|
| Koplingarstøðir | 298.025 | 289.337 |
| Býtisvirkir | 492.321 | 424.430 |
| **Tilsamans** | **790.346** | **713.767** |

**SEV**
Landavegur 92
Postboks 319
FO-110 Tórshavn

+298 34 68 00
www.sev.fo
sev@sev.fo

Roknskaparár: 01.01-31.12
V-tal: 331538

www.sansir.fo